## Til sølu

Ein Honda skootari X8-R-S sport, 1 ára gamal, koyrt 1900 km, til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Havnar Handverkarafelag**
Tróndargøta 16 · 100 Tórshavn
Tlf. 311548



## Dagligur leiðari

Fyri P/F Hólmalaks á Gomlurætt verður søkt eftir dagligum leiðara.

**Starvið**
Leiðarin skal hava dagligu leiðsluna um hendi, ið m.a. fevnir um samskipan av framleiðslu og sølu umframt umsiting.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Rætti umsøkjarin hevur royndir og evni at leiða og samskipa virksemið í einari framleiðslufyritøku.

Royndir innan alivinnu er ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

**Umsóknin**
Umsókn verður at senda skjótast gjørligt ella í seinasta lagi innan 1. september 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jens Reinert, stjóra, á tlf. 217679 ella 311861.

**P/F HÓLMALAKS**
Villingadalsvegur 39
FO-100 Tórshavn · Føroyar



## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
**Stongt vegna summarferiu til 21. aug.**





**Skorsteins-sóparin**

**er við til at halda umhvørvið reint**

Jimex Brenniovnar
Isokern Skorsteinsbjálving
Isokern Skorsteinselementir
Lúkur - Fuglaristir
Ventilar - Roykhattar

**Andrass á Krossbrekku**
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass



Original
bosal
Útstoyt



ES

**p/f Esmar Simonsen**
**Kambsdalur**
**FR-530 Fuglafjør›ur**
**Tlf. 444405**
**Fax444629**



## BRÚKTIR BILAR

**DAIHATSU CHARADE TURBO DIESEL**
**Litur:** Silver met.
**Árg.:** Mars 94
**Km.:** 146.000
**Kostn.:** Kr. 68.000,-

**DAIHATSU ROCKY 2.8 DIESEL JEEP**
**Litur:** Grønur
**Árg.:** Aug. 86
**Km.:** 140.000
**Kostn.:** Kr. 26.000,-

**SUBARU LEGACY 2.0 STATIONCAR**
**Litur:** Vínreyð met.
**Árg.:** Juni 95
**Km.:** 64.000
**Kostn.:** Kr. 128.000,-

**VOLVO 240 TURBO**
**Litur:** Blá met.
**Árg.:** Apríl 84
**Km.:** 148.000
**Kostn.:** Kr. 30.000,-

**FORD ESCORT 1.8 CLX HATCHBACK**
***Sóltak, hiti í forrúti, setr. el rútar, sentrallás v.m**
**Litur:** Svart met.
**Árg.:** Apríl 96
**Km.:** 78.000
**Kostn.:** Kr. 98.000,-

**SUBARU LEGACY 1.8 GI SEDAN**
**Litur:** Silver met.
**Árg.:** Nov. 91
**Km.:** 97.000
**Kostn.:** Kr. 78.000,-

**OPEL ASTRA S 5 hurðar**
**Litur:** Beige met.
**Árg.:** Mars 98
**Km.:** 24.000
**Kostn.:** Kr. 98.000,-

**DAIHATSU APPLAUSE 1.6 HATCHBACK**
**Litur:** Reyður
**Árg.:** Feb. 96
**Km.:** 54.000
**Kostn.:** Kr. 80.000,-

**BMW 325 ix 4 HJÓLSTREKK *91***
**Litur:** Reyður
**Árg.:** ( Feb. 87)
**Kostn.:** Kr. 80.000,-

**ROVER 214 Si 5 HURÐAR**
**Litur:** Reyð met.
**Árg.:** Maj 98
**Km.:** 28.000
**Kostn.:** Kr. 118.000,-

D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 • Boks 1079
Tel. 31 06 00 • Fax 31 06 50



**Føroya størsta úrval av**
## PAKKITILFARI
**úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*...sjálvandi til besta prísin!!*

FARPACK

*Staravegur 5, P.O. Box 3099*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*



variant

**Galvaniseraðir viðfestisvognar**



*Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!*

*Tosið við okkum!*
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



J|Ä|S|P|I KETLAR

*Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu*



**Bæði dupultir og einkultir**

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð. Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

**- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum**

**MARIA POULSEN & CO**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000



Hjálmur er "cool"






## VØRUKOYRING/ FLOGFRAKT



SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo

**GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR**

**Tel. 32 22 22**

Sosialurin - 311820



## Sig okkum frá



Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin




# Finskir málningar

*Leygardagin 19. august kl 16.00 letur finska Hanne Juga málningaframsýning upp í Norðurlandahúsinum*

Hanne Juga, er fødd 21. mars 1961 í Varkaus í Finlandi, har hon eisini er uppvaksin. Eftir lokið studentsprógv fór hon til Álands í eitt ár. Síðani kom hon heimaftur til Finland og Helsingfors, har hon síðani hevur verið búðsitandi. Her fór hon á yrkismálaraskúla, við tí fyri eyga at blíva leiktjaldamálari í sjónleika- og operahúsum. Hon fekk fyrst arbeiði við sjónvarpslýsingum, og í 1989 byrjaði hon á tí finska tjóðarút- og sjónvarpinum. Har starvast hon enn, og málar serliga bakgrundsmyndir. Í hesum starvi hevur hon miðvíst ment sínar listarligu gávur.

Upprunaliga hevur hon gjørt hetta fyri at betra um sítt sjónvarpsarbeiði. Men tíðirnar innan sjónvarpsheimin eru broyttar og framleiðsluhættirnir eru broyttir. Hetta hevur ført skiftandi arbeiðsuppgávur við sær. Í dag er minni brúk fyri leiktjaldamálarum, so at tíðin hevur eisini verið til listamáling. Leiktjaldamálingin hevur givið Hanne góðar royndir, sum hon nýtir gott av í sínum egna listaarbeiðið t.d. við ymiskum tilfari og litsamansetingum. Sjálvandi er tað eisini ein fyrimunur fyri sjónvarpsarbeiðið at hon hevur og støðugt fær egnar listarligar royndir.

Oftast málar hon útsýnið – ella rættari tað sum hon eygleiðir, og oftast landsløg. Tá møguleikin býðst fer hon út í náttúruna at mála. Málningurin gerst oftast liðugur á staðnum. Soleiðis myndar málningurin júst ta løtuna, sum eygleiðingin verur gjørd, og er soleiðis ikki ein endurminning av løtuni. Hanne dámar væl kensluna av at verða mitt í eini stórari heild, og við at mála skapast so við og við ein heilt onnur og sjálvstøðug eind, sum er sín egna heild – málningurin.

Í heyst skal Hanne Juga hava framsýning á sínum heimstaði, Varkaus, hvaðani hon flutti fyri eini 20 árum síðan. Á hesi framsýning ætlar hon m.a. at hava málningar við, sum eru málaðir í Føroyum. Um somu tíð hevur hon eisini framsýning í Helsinki á eini krógv undir festivalinum "Art goes kapkka".

Í norðurlendskum samstarvi hevur Hanne eisini verið virkin – bæði í arbeiðs- og privatlívi. Hon er virkin í Nordfag, sum arbeiðir við samskifti millum fakfeløg innan fjølmiðlaheimin. Privat er hon næstformaður í vinarfelagnum Finland – Føroyar, sum eitur "Tjaldur".

# Sandavíkingar í oljuvinnuna

Eitt nýtt føroyskt felag sum skal virka innan supplyvinnu í samband við oljuleiting og útvinning av olju, er stovnað í Sandavági. Navnið á nýggja felagnum er Viking Shipping. Talan er um eitt samstarv millum føroyska reiðaríið P/F Samvinnufelagið og norska reiðaríið Rovde Shipping A/S. Fyrsta týdningarmikla stigi í samstarvinum millum partarnar er ætlanin um, innanfyri stutta tíð, at fáa føroyingar umborð á supply-skip hjá norska felagnum til upplæringar, og næsta stigi verður síðani at leiga ella keypa eitt supplyskip at skráseta í Føroyum.

P/F Samvinnufelagið er í fiskivinnuhøpi eitt gamalt føroyskt felag, sum síðani stovnanina fyri 54 árum síðani hevur verið uppií saltfiskaveiðu, feskfiskaveiðu, sildaveiðu og svartkalvaveiðu í Barentshavinum, við Ísland, Grønland, Newfoundland og aðrastaðni. Eisini hevur felagið tikið lut í fiskivinnuvirksemi á landi. Seinastu 25 árini hevur tað tó verið rækjuveiða, um alt Norðuratlantshavið, sum hevur verið høvuðsvinnan hjá felagnum. Norska reiðaríið Rovde Shipping A/S er ein familjufyritøka, sum eisini hevur røtur innan fiskivinnuna. Í 1984 bygdu teir sítt fyrsta skip til oljuvinnuna, og hava teir spakuliga økt um flotan upp til 7 skip í dag. Í sept. í ár yvirtaka teir ein nýbygning fyri 350 mill. kr., sum er eitt serbygt skip sum serliga kemur at arbeiða við kápullegging.

Stjóri í nýggja felagnum er Jákup Egholm Hansen, sum seinastu 8 árini m.a. hevur verið formaður í Felagnum Rækjuskip. Hann var eisini av Felagskommununi í Vágum valdur sum umboð í sokallaða Suður-Vestur Samtakinum, sum var eitt samstarv millum kommununar í Vágum og sunnaru helvt av Suðuroy, um møguleikarnar hjá hesum økjunum at luttaka í føroyskari oljuvinnu. Umframt at verða stjóri, situr Jákup Egholm Hansen eisini í nevndini í nýggja felagnum, og hinir nevndarlimirnir eru Herluf Thomassen úr Sandavági og Petter Knardal og Oddvar Strand úr Noregi.



Jákup Egholm Hansen hevur gjøgnum farnu árini fylgt gjølliga við gongdini í samband við føroysku fyrireikingarnar til oljuleiting á føroyskum øki, og byrjaði ætlanin um at fara undir supply-virksemi so smátt fyri nøkrum árum síðani. Men seinasta ári hevur verið arbeitt miðvíst við ætlanini um føroyska supply-felagið, og at fáa ein góðan samstarvsfelaga við neyðuga kunnleikanum á økinum, og er nýggja felagið - Viking Shipping - úrslitið av hesum arbeiði.

Nýggja felagið hevur gjørt eina avtalu við Rovde Shipping í Noregi um tekniska ráðgeving v.m. Somuleiðis er avtala at nýggja felagið fær starvfólk til upplæringar umborð á skipum hjá norska felagnum. Ætlandi verður talan um bæði yvirmenn á brúnni, maskinfólk og matrósar, og tað sum serligur dentur fer at verða lagdur á er at seta føroysku manningarnar gjølliga inn í øll trygdar-, umhvørvis- og góðskukrøv ið sett verða frá bæði oljufeløgunum og frá reiðarínum. At enda er eisini ætlanin, at Viking Shipping í samband við oljuleitingina í føroyskum sjógvi, sum væntandi byrjar á sumri komandi ár, fer at leiga ella keypa eitt supply-skip. Um tað eydnast at fáa eina avtalu við eitt ella fleiri av oljufeløgunum um supply-skip í samband oljuleitingina, kemur hetta skipið undir føroyskt flagg, og koma teir føroyingarnir sum eru upplærdir hjá norska samstarvs-felaganum tá at manna skipið.

Nýggja felagið kemur í fyrstu atløgu at leiga skrivstovu í fyrrverandi rækjuvirkinum á havnaøkinum í Miðvági. Tá greitt er hvar í landinum ein útgerðarhavn kemur at liggja, verður endalig støða tikin til hvar felagið skal hava skrivstovu.

Ein tann fyrsta uppgávan hjá nýggja felagnum hevur verið at fyrireikað seg uppá luttøkuna á oljumessuni í Stavanger - ONS 2000 - har felagið luttekur á felags føroyska básinum. Stjórin í felagnum væntar, at júst nú ið Oljufyrisitingin fer at geva oljufeløgunum svar uppá umsøknir sínar um boriøkir, fer áhugin frá oljufeløgunum at fáa samband við føroyskar tænastuveitarar at verða stórur.

Stjórin í P/F Samvinnufelagnum, Jóhan á Plógv, er sera væl nøgdur við samstarvs-avtaluna ið gjørd er við norska felagið. Øll við bert eitt sindur av innliti í viðurskiftini hjá rækjuflotanum vita, hvussu trupul kor hesin skipabólkur hevur havt so at siga øll 90,ini, og rækjuflotin verður væntandi tann skipabólkurin sum fyrstur av øllum kemur at verða raktur av manningartørvi tá oljuvinnan av álvara byrjar. Tí kann hetta samstarvið innan supply-vinnuna gerast byrjanin uppá eina tilrættalegging av eini skilagóðari javnvág millum fiskivinnuna sum felagið hevur tykist við í 54 ár, og oljuvinnuna sum í framtíðini helst kemur at fáa sera stóra ávirkan á føroyska fiskivinnu.

# Concorde fekk 25 ár

*Heimsins skjótasta ferðamannaflogfar, tað bretsk/franska Concorde, flýgur ikki longur.*

Bretska flogfelagið, British Airways, gjørdi mánadagin av at seta síni flogfør av slagnum Concorde eftir ráðum frá loftferðslumyndugleikunum í London. Við avgerðini er einki Concorde-flogfar á flogi longur, tí franska felagið Air France, sum átti hini flogførini, hevur ikki flogið við teimum síðani vanlukkuna uttan fyri París tann 24. juli. Vanlukkan kravdi 113 mannalív.

Enn hava fronsku kanningarmyndugleikarnir ikki funnið ta endaligu orsøkina til vanlukkuna, og teir hava eisini nevnt, at kanningararbeiðið kann fara at taka upp til tvey ár. Hildið verður tó, at minst eitt av hjólunum á flogfarinum brast, áðrenn flogfarið lætti sær á, og at bresturin kann hava havt við sær, at metalstykki eru farin inn í ein av brennievnistangunum, so eldur kom í.

**Heimsins skjótasta**

Tað vóru fransmenn og bretar, sum í felagsettu sær fyri at byggja eitt ferðafólkaflogfar, sum skuldi flúgva skjótari enn ljóðið. Tann fyrsta royndarflúgvingin var við Toulouse í Fraklandi 2. mars í 1969, og í oktober sama ár eydnaðist tað at flúgva skjótari, enn ljóðið ferðast. Longu heystið eftir fleyg Concorde 001 tvær ferðir skjótari enn ljóðið.

British Airways og Air France keyptu 14 av teimum nýggju flogførunum, og í januar í 1976 fóru tey undir regluliga rutuflúgving. 13 av teimum 14 flogførunum hava verið í flúgving til vanlukkuna uttan fyri París, seks fyri Air France og seks fyri British Airways.

Í 1995 gjørdi eitt av Concorde-flogførunum eina roynd at flúgva runt jørðina. Flogið varð úr New York og runt knøttin aftur til New York. Ferðin tók 31 tímar og 27 minuttir, og so skjótt hevur einki annað ferðafólkaflogfar flogið um jørðina.

Concorde-flogfarið kann flúgva í 19.200 metra hædd og er tí einasta ferðafólkaflogfar, sum kann flúgtva oman fyri veður og vind, og sum tí sleppur undan luftholunum.

**Dýrur skjótleiki**

Concorde-flogfarið er 62 metrar langt og 11 metrar breitt. Men hóast tað kann tykjast stórt, hevur tað ikki pláss fyri meiri enn 100 ferðafólkum.

Tey fyrstu 20 árini, Concorde var í flúgving, ferðaðust 3,7 mió. fólk við hesum flogførunum. Men hetta vóru neyvan vanlig ferðafólk, tí tað var sanniliga ikki hvørs mans føri at keypa sær eina ferðaseðil til Concorde. Nevnast kann, at í fjør kostaði ein ferðaseðil úr London til New York og aftur til London einar 55.000 krónur.

Men fyribils flýgur Concorde ikki. Upprunaliga var ætlanin, at verandi útgávan av flogfarinum skuldi flúgva til 2005, og at ein nýggj útgáva skuldi takast í nýtslu í 2010.

Men fyribils fekk Concorde 25 ár.

# Norðurlendsk blaðfólk á skeið

í døgunum 3. august til 3. september verður skeið fyri norðurlendsk blaðfólk hildið í Norðurlandahúsinum.

Skeiðið vendir sær fyrst og fremst til blaðfólk, ið fáast við mentunarspurningar.

Fremsta evnið, ið skeiðluttakararnir fara at viðgera, er hvussu framtíðarútlitini fyri serføroysku mentanini eru á at lýta.

Her verður millum annað spuringurin um føroysku fjølmiðlarnir eru við til at seta skund á fráflytingina úr smærru bygdunum við so at siga bert at viðgera mentanina í størru býunum í landunum, tikin upp.

60 luttakarar vera við á skeiðnum. Meginparturin er fólk úr øðrum Norðurlondum.